## Stórir gestir

Havnarmyndugleikarnir í Aalesund hava fingið at vita, at 65 fremmand ferðamannaskip ætla sær hagar í summar. Tað fyrsta kemur tann 9. mai og tað seinasta tann 26. september. Tey best kendu skipini munnu vera »Queen Elizabeth 2« og »Queen Mary 2«, sum koma til Aalesund ávikavist 18. og 19. mai. Eitt annað stórt skip, sum kemur til Aalesund í summar, er »Jewel of the Seas«, sum kemur tann 25. juni við umleið 3.000 ferðafólkum.

## Hall á gjaldsjavna

Danmark hevði 1,1 mia. krónur í halli á gjaldsjavnanum í januar, vísa tøl hjá donsku hagstovun, men seinastu tríggjar mánaðarnar hevur Danmark havt 2,5 mia. krónur í avlopi i á gjaldsjavnanum. Tað er kortini 7,4 mia. krónur minni enn í sama tíðarskeiði fyri einum ári síðani. Danski handilsjavnin hevði 3,6 mia. krónur í avlopi í januar, og tað var væl meiri enn í desember. Orsøkin var minni innflutningur og størri útflutningur.

## Roknskapargreining yvir fiskavirkini

**Síðan 2001 hevur grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe gjørt eina sonevnda roknskapargreining, sum lýsir støðuna hjá fiskavirkisvinnuni í Føroyum. Virkini, sum eru við í greiningini fyri 2005, umboða tilsamans 78,6% av allari ráfiskanøgdini, sum er virkað á føroyskum fiskavirkjum**



*Bjarni Poulsen, cand.merk. aud., hevur ábyrgdina av roknskapargreiningini fyri Rasmussen & Weihe*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Greiningin hjá Rasmussen & Weihe fevnir í 2005 um tilsamans 9 feløg, sum reka fiskavirkir.

Síðan 2001 hevur felagið greinað roknskapir hjá fiskiflotanum og fiskavirkjum.

Greiningin byggir á almennu roknskapirnar fyri 2001 til 2005, men felagið hevur eisini útvegað sær eyka upplýsingar frá teimum feløgum, sum í sínum roknskapi ikki upplýsa um eitt nú ráfiskanøgd, nettosølu og ráfiskakostnað.

Virkini, sum felagið hevur í hesi greining, keyptu í 2005 tilsamans 78,6% av tí ráfiski, sum varð landaður í Føroyum og virkaður á føroyskum fiskavirkjum.

Tey 9 feløgini í greiningini tóku av hesum 78,6 prosentunum í 2005 ímóti hesi ráfiskanøgd: P/F Kósin (14,1%), P/F Føroya Fiskavirking (52,6%), P/F Fiskavirkið (6,6%), P/F Vaðhorn Seafood (2,7%), P/F Delta Seafood (7,3%), P/F Sandoy Seafood (9,8%), P/F Norðís (3,3%), Sp/f Eystís (1,9%) og P/F Vestís (1,7%).

Rasmussen & Weihe visa á, at roknskapirnir feløgunum eru settir upp ymiskt, og konti eru bólkaðar ymiskt, eins og feløgini neyvan skráseta sínar bókingar heilt eins.

- Hetta kann viðføra, at feilir kunnu vera í samanlagda roknskapinum fyri øll feløgini, men hetta hevur helst lítlan týdning, sigur Bjarni Poulsen, sum hevur ábyrgdina av greiningini fyri grannskoðarafelagið.

Hann sigur, at har dóttirfeløg eru, ið eisini reka fiskavirki, sum eru við í greiningini, er úrslitið hjá dóttirfeløgum »eliminerað« í rakstrinum hjá móðirfelagnum, eins og kapitalpartarnir eru »elimineraðir« burtur úr fíggjarstøðuni hjá móðirfelagnum. Á henda hátt kemur úrslit og eginpeningur hjá dóttirfeløgum bert fyri ta einu ferðina í greiningini.

Lagt verður aftrat, at P/F Palm Seafood og P/F Suðurís eru ikki við í 2004 og 2005.

# Gjaldførið hjá fiskavir



**– Hóast nøkur av virkjunum klára afturgongd eina tíð aftrat, hevði tað helst verið skilagott at umhugsað, hvussu raksturin av virkjunum kundi verið rationaliseraður – ella uppaftur betri, hvussu størri ferð kundi komið á virðisøkingina, halda Rasmussen & Weihe, sum hava hugt at roknskapunum hjá fleiri fiskavirkjum**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Føroysku fiskavirkini, sum eru við í greiningini hjá Rasmussen & Weihe, hava sum heild verið fyri stórari afturgongd árini 2001 til 2005.

Tað sigur felagið í síni niðurstøðu.

- Árini 2001-2002 var talan um eina lítla afturgongd, men í 2003 var afturgongdin so stór, at samlaði raksturin hjá virkjunum gav eitt lítið hall.

Í greiningini verður ásannað, at virkini hava givið stórt hall, bæði í 2004 og í 2005.

- Tað tykist sum kappingin um ráfiskin við útlandið harðnaði munandi í 2002 og serliga í 2003. Við árslok 2005 var kappingin um rávøruna framvegis hørð.

Tølini í roknskapinum benda á, at virðisøkingin samanborið við útreiðsluvøksturin til lønir og aðrar útreiðslur ikki er nóg stór.

- Tí eru virkini ikki nóg kappingarfør, tá ræður um at kappast við útlendskar keyparar um ráfiskin.

### Fýra viðurskifti

Sambært Føroya Ráfiskakeyparafelag eru tað serliga fýra viðurskifti, sum ávirka kappingarførið hjá føroysku flakavinnuni, 1) lønarvøksturin hevur verið stórur seinastu árini, 2) kursurin á amerikanska dollaranum hevur verið rættiliga lágur, 3) støddin á fiski – serliga upsanum - er minkað munandi og 4) fiskaprísirnir á marknaðinum eru lækkaðir seinastu árini.

- Sostatt tykjast framtíðarútlitini ikki at benda á nakra serliga framgongd – um ikki tað eydnast virkjunum at framleiða fiskaúrdráttir, sum skapa størri avkast, at marknaðarfyritreytirnar broytast, umframt at útreiðsluvøksturin verður